## ONGANTÍÐ AFTUR

# FÓLKADRÁP

Mett verður, at meira enn 100 milliónir fólk hava latið lív í fólkadrápum tey seinastu 100 árini

**HER ERU NØKUR DØMI:**

1938 – 1945
### HOLOCAUST
6 MILLIÓNIR JØDAR LÓTU LÍV

1928 – 1953
### STALINDRÁPINI
11–14 MILLIÓNIR POLITISK MÓTSTØÐUFÓLK LÓTU LÍV

2011 – 2020 *
### SÝRIA
500 TÚSUND LATIÐ LÍV OG MEIRA ENN 13 MILLIÓNIR FLÓTTAFÓLK

1992 – 1995
### BOSNIADRÁPINI
100 TÚSUND LÓTU LÍV

1915 – 1922
### ARMENSKA FÓLKADRÁPIÐ
1,5 MILLIÓNIR ARMENARAR LÓTU LÍV

1988
### KURDADRÁPIÐ HJÁ SADDAM HUSSEIN
1988: 180 TÚSUND KURDAR LÓTU LÍV

2003 – 2020 *
### DARFURDRÁPINI
300 TÚSUND LATIÐ LÍV

2017–2020
### MYANMAR
10 TÚSUND LATIÐ LÍV OG MEIRA ENN 730 TÚSUND FLÓTTAFÓLK

1975 – 1979
### REYÐU KHMERDRÁPINI
1,7 MILLIÓNIR KAMBODARAR LÓTU LÍV

1994
### RUANDADRÁPINI
800 TÚSUND TUTSIARAR LÓTU LÍV

NÁM
AMNESTY INTERNATIONAL

BOSNIADRÁPINI

1992 – 1995

# BOSNIA



## 100 TÚSUND LÓTU LÍV

**Kríggið í Bosnia var eitt blóðugt stríð millum fólkabólkarnar í landinum: ortodoksar serbar, katólskar kroatar og serbiskar muslimar.**

Meira enn ein millión fólk lótu lív í krígnum, sum vardi í hálvt fjórða ár og var merkt av blóðbaði, neyðtøkum, burturrakstri, fangalegum og pínìng. Í býnum Srebrenica vórðu útivið 8.000 bosniskir-muslimskir menn og dreingir fyribeindir í einum hópdrápi, sum ein ST-dómstólur seinni hevur dømt at vera fólkadráp.

NÁM

AMNESTY INTERNATIONAL



BOSNIADRÁPINI

1992 – 1995

# BOSNIA

## 100 TÚSUND LÓTU LÍV

**Eitt tað mest blóðuga kríggið í Evropa síðani 2. veraldarbardaga er kríggið í Bosnia Hersogovina fyri 25 árum síðani, frá 1992–1995.**

Umleið 100.000 fólk doyðu. Umleið 2 mió. vórðu tvingað frá húsi og heimi og gjørdust flóttafólk. Nógv flýddu til Evropa, summi enntá til Føroya. Ein partur av hesum krígnum er seinni staðfestur at vera fólkadráp, tvs. ein roynd at týna ein samfelagsbólk.

Gamla Jugoslavia var eitt ríki við fleiri ymiskum republikkum og fólkasløgum. Eins og USA er eitt ríki við nógvum statum, so var gamla Jugoslavia eisini eitt ríki við nógvum statum. Eitt sosialistiskt ríki, sum fyrst í 90-unum datt sundur, eftir at kalda kríggið endaði og kommunisman hevði tapt. Fleiri tjóðskaparrørslur tóku seg upp í hesum ymisku økjunum, borgarakríggj brast á, og gamla Jugoslavia bleiv til seks nýggj sjálvstøðug lond: Slovenia, Kroatia, Bosnia, Serbia, Makedonia og Montenegro. Tað er framvegis stríð um Kosovo.

NÁM

AMNESTY INTERNATIONAL



BOSNIADRÁPINI

1992 – 1995

# BOSNIA

100 TÚSUND

LÓTU LÍV

**Ein tann daprasta hendingin í hesum krígnum er fólkadrápið í einum lítlum fjallabýi, sum eitur Srebrenica. Ein býur við einum muslimskum meiriluta, og ein býur har muslimar úr øllum Bosnia flýddu til fyri at leita sær friðskjól.**

Srebrenica varð kringsett av serbiskum herdeildum, og tí sendi ST (Sameindu Tjóðir) friðarvarðveitandi herdeildir til Srebrenica fyri at verja býin. Men ein dagin í juli 1995 stormaðu serbar býin undir leiðslu av einum herovasta, sum æt Ratko Mladic.

Kvinnur og gentur vórðu settar í bussar og sendar úr økinum. Fleiri enn 8.000 menn og dreingir millum 16 og 65 ár vórðu tiknir, skotnir og tveittir í hópgravir. Og fleiri túsund kvinnur og gentur vórðu samstundis neyðtiknar og seksuelt misbrúktar.

NÁM

AMNESTY INTERNATIONAL



BOSNIADRÁPINI

1992 – 1995

# BOSNIA

**100 TÚSUND**

**LÓTU LÍV**

**Altjóða krígsbrotsmannadómstólur í Haag hevur síðan staðfest hesa hendingina sum verandi fólkadráp.**

Dómstólurin í Haag hevur eisini dømt ymiskar einstaklingar fyri at hava lagt til rættis og framt hetta hópdrápið, m.a. Radovan Karadzic, serbiskur politikari, sálarlækni og skald. Og serbiski generalurin Ratko Mladic.

**Nógvir eru spurningarnir viðvíkjandi hesum krígnum:**

Hvussu ber tað til, at hetta fólkadrápið kundi henda?

Hví hendi hetta fólkadrápið, tá altjóða samfelagið hevði sett inn herdeildir at verja sivila fólkið í Srebenica?

NÁM

AMNESTY INTERNATIONAL